## Oddagrein



**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*

# LEGGIÐ ØLL KORTINI Á BORÐIÐ

Vit hava á hesum stað fleiri ferðir víst á tað óhepna við umsitingini av fólksins ognum í Tryggingarfelagnum Føroyar – og teirra løgna máta at halda maktina so tætt at stjórn og nevnd, at veruligu eigararnir als onga ávirkan hava.

Nógva umrøðan hevur ført til, at tvær løgtingskvinnur hava reist málið á tingi, og í dag (eftir at blaðið er farið til prentingar), skuldi Johan Dahl svara tveimum munnligum fyrispurningum, einum frá Katrini Dahl Jakobsen og einum frá Bjørt Samuelsen.

Tað er ógvuliga óheppið, at so nógv og so negativ umtala er um størsta aktørin á føroyska fíggjarmarknaðinum – og hetta er eitt skúladømi uppá, at her er ein skipan, sum als ikki er hóskandi. Tá hesin stóri aktørur heldur ikki vil flyta seg – og so seint sum í hesum mánaðinum fellir eitt uppskot um størri opinleika, eitt uppskot, sum hevði gjørt, at veruligu eigararnir, sum eru tryggingartakararnir, høvdu fingið ávirkan, ja so styrkir tað bara um negativu umtaluna.

Tá nevnd og stjórn eisini játta sær sjálvum milliónaupphæddir í eyka samsýning, ja so verður støðan grotesk. Vit skulu minnast til, at tað sum higartil er komið fram um pengar, sum nevndin hevur játtað sær sjálvum og fráfarna stjóranum, er úr roknskapinum fyri 2010. Men nógv er hent síðani tá. Felagið hevur fingið nýggjan stjóra, og felagið hevur keypt ein stóran banka. Um tað at Tryggingarfelagið fyllir 70 útloysir stórar eykasamsýningar til nevndarlimirnar, hvat so við bankakeypinum? Vit sóu líknandi sirkus, tá Føroya Banki varð privatiseraður, tá skuldu nevnd og stjórn eisini hava risa stórar eyka samsýningar, tí tey høvdu havt tað so strævið í sambandi við privatiseringina.

Tað besta, sum Tryggingarfelagið Føroyar nú kann gera, tað er at leggja kortini á borðið: Nevnd og stjórn eiga at fortelja Føroya fólki alt um samsýningar hjá stjórn og nevnd – og um tey hava játtað sær fleiri milliónir síðani ársbyrjan. Tað mátti ikki verði neyðugt at bíðað, til



pressan sær roknskapin um eitt ár. Fólkið hevur krav upp á fullan opinleika, tí mistankin um, at persónarnir, sum ganga aftur allastaðni í samtakinum, játta milliónir til sjálvs skaðar Tryggingarfelagið Føroyar, og tað skaðar Eik Banka, sum ikki hevur brúk fyri at endurtaka somu margháttligu leiðslu, sum koyrdi bankan á heysin, og sum kostaði mongum vanligum føroyingi sín dýrt kenta sparipening – og í fleiri førum eisini læntar pengar.

Men politisku skipanini so líkt, so kemur hon darlandi langt aftan á, at skaðin er hendur. Javnaðarflokkurin við fíggjarmálaráðharranum á odda hevur nú sagt »a«. Fyri ikki at blíva gjørdur til gjøldurs, so má hann eisini siga »b«!

**» Sigið okkum, um Eik-keypið eisini gevur leiðsluni eykaløn**

## Flossi hevur onga ávirkan!

Kringvarpið hevur biðið okkum rætta upplýsingarnar um hugsaða sambandið millum Tryggingarfelagið Føroyar og Dag & Viku, sum vórðu bornar fram her á síðuni mánadagin undir yvirskriftini »*Man Flossi ávirka Kringvarpið?*«



Kári Durhuus, tíðindaleiðari og Høgni í Jákupsstovu, redaktiónsleiðari, siga, at pástandurin er faktuelt skeivur:

»Dagur & Vika hevur ongan sponsor, tí talan er um óhefta tíðindasending, ið er partur av samlaða tíðindaflutninginum í Kringvarpi Føroya, sum er óheftur av seráhugamálum«, siga teir.

Og púra rætt hava teir. Av tí at tað ikki er loyvt at hava lýsingar í eini sending, so varð Veðrið tikið burtur úr Degi & Viku, tá Tryggingarfelagið bleiv sponsorur hjá Veðrinum, sum er ein sjálvstøðug sending.

Teir vísa á, at hetta við at verða óheft av seráhugamálum er ein meginregla í fjølmiðlaløgfrøði og siðvenju, sum m.a. gongur aftur í Kringvarpslógini, Public Service-sáttmálanum og "Leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið" og at sambært "Leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið", punkt 4.12, eigur Sosialurin at rætta skeivu upplýsingarnar skjótast gjørligt.

– Og tað gera vit hervið treytaleyst!

Kári Durhuus og Høgni í Jákupsstovu vísa samstundis á, at tað annars eru redaktionellar avgerðir hjá báðum redaktiónum á Tíðindadeildini, sum eru avgerandi fyri, hvørt eitt mál verður tikið upp ella ikki.

– Tað er ikki eitt sjálvstøðugt "kriterie" at taka málið upp, bara tí aðrir miðlar hava skrivað um tað. Sostatt er tað ein grov skuldseting mótvegis Tíðindadeildini í Kringvarpi Føroya at leggja Tíðindadeildina undir ikki at viðgera Tryggingarfelagið Føroyar, tí Tryggingarfelagið sponsorerar veðrið og møguliga lýsir í Kringvarpinum. Hvørki veðrið ella lýsingavirksemið hava nakað við tíðindaflutningin at gera. Hendan skuldsetingin er brot á "Leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið", siga teir.

*Vit viðganga, at hetta var ein »illavorðin« insinuering. Mín hondina á hjartað, hetta var bara eitt prik – ikki endiliga til Kringvarpið, men meira til politisku skipanina, sum gevur Kringvarpinum so vánaligar sømdir, at okkara almenna public service kringvarp skal grundast á kommersielt virksemi. Tað er ikki hóskandi, og skommin er hjá politikarum og ikki hjá dugnaligum kringvarpsfólkum:*

***Eirikur Lindenskov***
***blaðstjóri***



**» Vælkomin til Grønlands**

KUUPIK KLEIST
OYGGJABLAÐ SÍÐA 16



**» Undirhaldandi karaktermorð**

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 14

## 100 milliónir frá Jørgen

So blíður er hann, fólkafloksformaðurin, tí hann vil geva okkum heilar 100 milliónir krónur í skattalætta, tá gjaldið til Heilsutrygd verður flutt á fíggjarlógina.



Tað skal ætlandi gerast 1. januar í 2012, at vit sleppa undan at gjalda til Heilsutrygd, tí gjaldið verður flutt yvir skattin.

Tað er í hesum sambandi, at Jørgen Niclasen ætlar at lata okkum skattalættan, tí skatturin skal ikki hækka, sigur hann, tó at hetta skal gerast í stigum.

Hyggjuráðini hjá Jørgeni Niclasen til tess at megna hendan skattalættan eru at spara innan fyrisiting, umsiting og eftirlit.

– Alt hetta kostar jú 800 milliónir, sigur Jørgen, so hvat er tað at spara ein áttandapart?

Tí fólkafloksformaðurin heldur, at vit hava alt ov nógvar almennar stovnar, tí skulu vit hava samanleggingar – ráð skulu leggjast saman, og stovnar skulu leggjast saman fyri at fáa eina rationellari fyrisiting.

– Og tað ber til, sigur Jørgen, hóast hann ikki hevur roknað upp á tað og ikki vil siga, hvørjir stovnar, ið skulu leggjast saman.

*Og hetta sigur maðurin, sum gongur fyri dupulta løn í tinginum – hann fær bæði løgtingsløn og landsstýrisløn. Góði Jørgen, hvussu kanst tú tosa um almennar sparingar, tá tú gongur á odda sum eitt alment oyðsl?*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja*
*tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*